# Um toxoplasmosis í Føroyum.

Eftir *R. K. Rasmussen.**

Toxoplasmosis er sjúka, sum elvist av einari frumkyknu, toxoplasma; hon er 2—4 mikron tjúkk, 4—8 mikron long og eitt sindur bogin. Hetta er snúltari, fyrstu ferð funnin í 1908 av *Nicolle* og *Monceaux* í Norðurafriku. Sjúkan er longu nú kend bæði hjá menniskjum og hjá mongum ymissum dýrum víða um á jörðini — eisini í Svíaríki, Noregi og Danmörk. — Óneyðugt er her at gera burtur úr sögu toxoplasmonisis. Hon er — júst tí sjúkan er nýggj — sögd so ofta í seinnu árum, næstan í hvörjari ritgerð, sum nemur hetta evnið. Her verður tí bert víst á nakrar av teim ritgerðum, sum fáast við toxo-plasmosis í Danmörk, og sum hava týdning fyri sjúkuna í Föroyum.

Hin fyrsta danska lýsingin av toxoplasmosis er í ritgerð eftir *M. Christiansen* (1935—36)[1]: »De vigtigste sygdomme hos vildtet« í táttinum um harur. Har sigur hann m. a.: »Af andre formentlige smitsomme haresygdomme skal jeg nævne en forelöbig ætiologisk ukendt lidelse, som jeg har iagttaget nogle gange, ialt hos 13 harer«. Síðan kemur ein ógvuliga greinilig lýsing av uppskurðinum, sum »i alt væsentligt var ens for dem alle«. Seinni hevur roynst, at sjúkan var toxoplasmosis, og eru tær sjúkligu likamsbroytingar

*) týtt hevur Jóhannes av Skarði.

hennara soleiðis lýstar, uttan at hann, ið lýsti, visti hvör sjúkan var. Sanna náttúra hennara varð ikki avgjörd fyrr enn í 1948. Sjúkuavgerðin toxoplasmosis varð í Danmörk gjörd fyrstu ferð av *J. P. Sjolte*[2] í 1947 við at skera upp hund. Frumkyknan varð ávíst í litaðum tunnflísum.

Hin 15. februar 1948 kom aftur ein ritgerð eftir *M. Christiansen*[3]; hann hevði í tíðarskeiðinum 1. jan. 1935—31. dec. 1947 gjört rannsóknir við 2411 harum, tær flestu sjálvdeyðar. Av teimum sýndu 211 = 8,75 % tær sjúkligu likamsbroytingar, sum eyðkenna toxoplasmosis. Hjá 21 av hesum 211 dýrum varð snultarin ávístur í histologiskum tilbúningum úr eitlum, sum broyttu av, og úr livur, milti og lunga.

Nakrar fáar dagar seinni — hin 26. febr. 1948 — kom *H. Boesen*[4] fram við fyrstu donsku ritgerð um sjúkuna hjá fólki: »Et tilfælde af kongenit toxoplasmose«. 5 mánaðir seinni — juli 1948 — varð prentað 3. ritgerð eftir *M. Christiansen*[5] um innáborna toxoplasmosis hjá harum. Hann prijaði inn í 5 harur rört hold frá ígjördum músum, sum Statens Seruminstitut hevði latið honum. Harurnar doyðu eftir 7—8 dögum. Við uppskurði vóru hjá öllum funnin eyðkenni fyri toxoplasmosis, og snultarar vórðu lættliga ávístir hjá teimum öllum.

Sjúkligu likamsbroytingarnar við haru-toxoplasmosis eru so, uttan at nakar í grundini visti tað, kendar og lýstar í Danmörk síðan 1935. Eitt serligt slag av somu sjúku hjá fólki, toxoplasmosis í teimum atkomandi eitlunum, hevur á henda hátt verið kent av *Fridtjof Bang* síðan 1942. Lýsingin av hesum eitlabruna er kortini ikki komin fyrr enn nógv seinni: Í 1951 og 1952 eftir *Siim*[6,7] og í 1953 eftir *Fridtjof Bang*[8].

O. u. 1948—49 fór *Siim* á Statens seruminstitut undir reglubundnar rannsóknir av blóði, sum sent var til rannsóknar frá sjúklingum við hita av ókendari orsök. Hann nýtti meinlíkan arbeiðshátt og tann, sum dr. *Martin Kristensen*[9] í 1927 nýtti við so góðum úrsliti við rannsóknum

sínum viðvíkjandi tí týdningi, bacillus abortus Bang hevur sum sjúkuelvandi smávera fyri fólk. Á hendan hátt fann *Siim* m. a. toxoplasmosisvísingar hjá einum sjúklingi har hövuðssjúkdómseyðkennið var hiti og eitlatroti allastaðni »Derefter gik man over til at undersöge andre lignende tilfælde, hvor diagnosen var adenitis, polyadenitis eller obs. for mononucleose, idet man udförte de serologiske reaktioner paa blodpröver, der var indsendt til institutet til undersögelse for Poul Bunnell's reaktion«. Á henda hátt komu í 1951 upp teir tveir sjúkratilburðir í Föroyum, sum greint er um niðanfyri. Í 1951[6] kunngjördi *Siim* 7 tilburðir av toxoplasmosis, har eyðsýnasta sjúkumerkið var troti av teimum atkomandi eitlunum — ein sjúkutilburður, sum eingin hagartil hevði varnast. Eitt ár seinni — í 1952 — skildi hann toxoplasmosisfrumkyknuna frá úr einum trútnum eitli hjá 17 ára gentu við at prija frá honum inn á mýs. Eisini hevði gentan positiva sveitavatnsvísing fyri toxoplasmosis, og kanning av tí burturtikna eitlinum vísti tær sjúkligu broytingar, sum eyðkendar eru fyri toxoplasmosis.

Um árslok 1951 sá hann, ið hetta skrivar 2 sjúklingar við toxoplasmosis. Sjúkrasögur teirra eru:*).

I. ♂ *J. M. F. E., f. 15/1 1943.* Smittaður við tuberklum í okt. 1945 av manni í grannahúsi; tá búði hann í eini bygd uttan fyri Eiðis læknadömi. Sigst í sambandi við smittuna at hava havt hita. Kom í 1947, 4 ára gamal til E og hevur búð her síðan.

Meslingafarsótt í E og í grannabygdini F heystið 1951. Fekk hesa sjúku hin 11. okt. 8 $^3/_4$ára gl. Hitin högur teir fyrstu dagarnar — var ein dag oman fyri 40° — men skjótt einans lítil hiti. Hóast drongurin kendi sær einki mein, helt lítilhitin á eina tíð: Um morgunin ímillum 37°,0 og

*) Eg takki P. Dahl, yvirlækna, Dronning Alexandrines hospital, fyri lán av sjúkadagbókunum hjá hesum báðum sjúklingum.

37°,3, um kvöldið ímillum 37°,6 og 38°,3. Hin 29 okt. var lækni fyrstu ferð hjá dreinginum. Einki sjúkligt ansað, undantikið hitan. At síggja til lítið sjúkur. Lækni aftur hjá dreinginum hin 8. nov. Tá vóru at finna fleiri eitlar á vinstru síðu á hálsinum og av tí at drongurin framvegis hevði eitt sindur av hita, varð hann hin 12. nov., 1 mánað eftir at hann hevði fingið meslingarnar, lagdur inn á Dronning Alexandrines hospital í Tórshavn fyri adenitis colli, og var við hesa sjúkuavgerðina helst hugsað um tuberklabruna í eitlunum, kanska elvdur av meslingunum. Við fyrstu sjúkuvitjan h. 29. okt. varnaðist læknin ongan eitlotrota, men við vissu kann ikki sigast, at ikki longu tá var *nakað* av trota í eitlunum á hálsinum.

Eitlarnir, ið sum nevnt bert vóru vinstrumegin, vóru nakað ymissir til stöddar og fastleika. Miðskeiðis undir m. sternocleidomastoideus var ein áflatur 2—3 cm stórur, bleytur eitil, annars eitt rað av föstum, at kalla hörðum, ikki sárum, allar vegir leysum eitlum, sum rukku heilt frá kjálkabeinshyrninum til herðablaðið, allir sjónskir gjögnum húðina, frá ertna- til stíva kaffibönastödd. Annars at síggja til einki sjúkligt hitan undantiknan.

Drongurin varð nú verandi á Dronning Alexandrines hospital í Tórshavn frá 12. nov. til 22. des. 1951. Við rannsóknum har varð funnið: Eitlarnir nakað tað sama, sum tá hann fór heiman; hitin einans eitt sindur ovhögur tann fyrsta dagin, annars í rættlagi alla tíðina á sjúkrahúsinum. Blóðkroppafallið varð kannað 4 ferðir; tá hann kom á sjúkrahúsið var tað 15 og var fallið niður í 9 (1 tíma), tá hann aftur fór av sjúkrahúsinum. Mantoux-vísingin var positiv. Röntgenrannsókn av lungunum vísti högru lungarót í störra lagi, eitt sindur av kálki í vinstru lungarót. Blóðstrokstilbúningur kannaður 2 ferðir. Samstundis vórðu blóðkropparnir taldir:

| | Hvítu blóðk. | Reyðu blóðk. | Neutrof. L | Eosinof. L | Basof. L | Lymfoc. | Monoc. | Hæmo-gl. | Index |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1951 13/11 | 11.280 | 6,5 m. | 20 % | 3 % | 0 | 8 % | 69 % | 78 % | 0,6 |
| 8/12 | 10.600 | 8,15m. | 23 % | 5 % | 2 % | 13 % | 57 % | 88 % | 0,54 |

Blóð, sum varð sent Statens seruminstitut í Keypmannahavn, gav onga Poul Bunnell's-vísing. Her var, við atliti til tað sum skrivað er frammanundan — uttan at biðið var um tað — kanning gjörd viðvíkjandi toxoplasmosis. Bæði toxoplasmahvörkigerðarvísing og komplementbindingarvísing vóru positivar — ávikavist í tynning 1:6250 og 1:256. Aðrar læknaligar rannsóknir vístu einki.

Beinan vegin svarið frá Statens seruminstitut var komið til Föroya, varð blóð frá móðrini sent til Keypmannahavnar at kanna fyri somu sjúku. Báðar vísingarnar vóru negativar — ávíkavist í tynning 1:10*) og 1:2. Í húsi vóru afturat faðir og 2 yngri börn, og öll vóru frísk — eins og móðurin var tað.

II. ♂ *J. J., f. 25/5 1900.* Búði í L. Tveir paratyfussmittuberar (faðir og dóttir) í grannahúsi. Koppsettur ímóti hesi sjúku fleiri ferðir við árs millumbili, síðstu ferð í juli 1950. Ikki koppsettur summarið 1951. Seinasta koppseting var so 1½ ár áðrenn hann sjúklaðist av sjúkuni, sum nevnd er niðanfyri.

Hevði verið frískur frammanundan. Var burtur og fiskaði summarið 1951. Kom heim aftur í byrjan oktober. — Kendi seg ikki heilt frískan hin 9/12 um morgunin. Um kvöldið 38°,4. Dagin eftir 39°,6/39°,5. 11/12 38°,7/38°,6 12/12 37°,4/37°,0 13/12 37°,0/38°,6 14/12 38°,6/38°,6 og 15/12 38°,6/37°,6. Lækni varð biðin at koma um kvöldið

*) 1:10 verður her av Statens seruminstitut mett at vera negativt.

hin 13/12. Hövuðpína var einasta mein, hann kendi sær, at síggja til einki sjúkligt, hitin undantikin. — Widals-vísing 13/12, 14/12 og 15/12 : + 1/50 fyri paratyfus og + 1/25 fyri landfarsótt. Um henda fyrsta veika vísingin hevði havt nakað at gera við paratyfus, áttu vit at væntað sterka hækking 2 næstu dagarnar, men so var ikki. Skarn varð sent Statens seruminstitut 14/12; svarið kom, sum væntandi var, ikki fyrr enn nakað var umliðið. Tað ljóðaði: Í skarninum ongar sjúkuelvandi smáverur. — Tó at — nú sjúkan hevði varað í 7 dagar — einki fast var um at halda við avgerðini paratyfus, var henda sjúkan, tá hugsa verður um hitt hættiliga grannalagið, hin eyðvaldasta sjúkuavgerð. Eisini var matvörukrambúð í húsinum, tí var ógjörligt at hava sjúklingin heima longur til framhaldandi eftiransan, og 17/12 1951 varð hann lagdur inn á Dronning Alexandrines hospital í Tórshavn at kanna viðvíkjandi paratyfus. Hann var latin út aftur haðani 1/2 1952.

Tær 6 vikurnar, hann var á sjúkrahúsinum ansaðist: Hiti í stívan mánað, fyrst högur — upp í 40° — og alla tíðina ójavnur, men uttan eyðsýnan mun á kvöldi og morgni, minkandi smátt og smátt, men ikki javnan. Lívæðraslátturin vísti ongantíð nakað óvanligt, hann var hvörki dikrotur eyðsýniliga seinur ella serliga skjótur. Widals vísing 8/12 og 12/12 var veikt positiv viðvíkjandi paratyfus (1/50 og 1/25) negativ viðvíkjandi landfarsótt. Blókroppafallið varð mált 4 ferðir: 1. ferð dagin eftir at hann kom á sjúkrahúsið, síðstu ferð 2 dagar áðrenn hann fór haðani. Tölini vóru 19, 26, 25 og 23 (1 tíma). Blóðrannsóknin vísti:

| | Hvítu blóðk. | Reyðu blóðk. | Neutrof. L | Eosinof. L | Basof. L | Lymfoc. | Monoc. | Hæmogl. | Index |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1951 27/12 | 6.000 | 7,15m. | 21 % | 1 % | 0 | 58 % | 21 % | 85 % | 0,6 |
| 1952 6/1 | | | 58 % | 5 % | 1 % | 21 % | 14 % *) | | |
| 1/2 | 5.200 | 8,0 m. | 34 % | 5 % | 5 % | 12 % | 44 % *) | 95 % | 0,53 |

Á Statens seruminstitut vóru ongar sjúkuelvandi garnabakteriur funnar, og Widalvísingin var negativ bæði viðvíkjandi landfarsótt og paratyfus. Eingin vísing fyri bacillus abortus Bang. Poul Bunnell's vísing var negativ. Við atliti til fyrr nevnda reglubundna rannsóknararbeiði við blóði, sum sent var til hesa roynd, varð eisini roynd toxoplasmakomplementbindingarvísing. Hon var positiv í tynning 1:128.

Hin 14/1 varð gjördur sternalstingur. Sogan varð rannsakað á radiumstöðini í Aarhus. Endin á svarinum, sum var sera greiniligt, ljóðar so: »Det udelukker dog ikke, at der kan foreligge en leucæmi; men det synes dog ikke sandsynligt«.

Í húsi hjá sjúklinginum vóru: Konan, ein dóttir, sum var 21 ár og 2 synir, sum vóru ávikavist 14 og 8 ár. Tá ið hann var komin heim, varð blóð frá konuni, dóttrini og 14 ára syninum send til rannsóknar á Statens seruminstitut. Toxoplasmakomplementbindingarvísing var hjá öllum negativ <1 :2. Toxoplasmahvörkigerðarvísing ógvuliga veik positiv 1:10 hjá móðurini og dóttrini, negativ hjá 14 ára dreinginum. Tynning 1:10 er har av stöðini mett at vera ógviliga veikt positiv. Eftir hesum kunnu vit tó neyvan taka nakra

*) Nögdin av hesum kyknum vóru óstadnar.

avgerð. Hetta sama tal (1:10) var av sama rannsóknarmanni í sjúkusögu I mett at vera ÷.

Vit lata tí als ikki so veikar vísingar koma upp í part í söguni frameftir. Hvörki heima ella í Tórshavn kom fram nakað útbrot á húðina. Miltið og livurin vóru ikki vaxin í stödd. Eingin troti av eitlunum og einki mein í liðunum. Hvörki lívsýki ella gulusótt.

Hesir báðir tilburðir av toxoplasmosis eru teir fyrstu í Föroyum, og higartil kenna vit bert teir. Sum omanfyri nevnt mugu vit takka reglubundnu rannsóknunum hjá Statens seruminstitut fyri sjúkuavgerðina. Hjá 8 ára dreinginum var sjúkan í eitlunum á hálsinum. Hjá 51 ára gl. manninum líktist sjúkan mest blóðeitran. Hin fyrri atburðurin hjá sjúkuni man nú — tað kunnu vit takka dr. Siim og dr. Fridtjof Bangs rannsóknum — vera heldur vanligur at finna, men hin seinni man enn vera sjaldsamur — ið hvussu er hjá fólki.

Vit kunnu ikki væl halda, at toxoplasmosis-vísingarnar í sveitavatni frá hesum báðum sjúklingum eru komnar av tilviljum. Vælkent er, at »disse reaktioner vil være positive gennem flere år, om end med langsomt faldende titre« (*Siim*[11]). Líkindi eru tí til, at blóðið frá einum menniskja kann geva toxoplasmavísingar við einihvörjari hættiligari sjúku, uttan at hetta menniskja í lötuni er sjúkt av toxoplasmosis. Hesar vísingar eru tá bert farið eftir eini hvörjari nú heilt lektari sjúku ella merki eftir eini ígerð, sum aldri hevur givið sjúkdómskenslu.

Drongurin í 1. sjúkasögu varð ikki vitjaður av lækna ímeðan hann var útsligin av meslingum. Vit kunnu tó ikki væl vera í iva um, at hann hevði meslingar. Henda sjúkan var í mongum húsum í bygdini, og bæði yngru systkin hansara fingu meslingar aftan á hann. Hendingaferð kemur saman við toxoplasmosis eitt útbrot á húðina; men helst kemur hetta bert hjá ógviliga hættiligum tilburðum, og, tað vit

vita, bert hjá tilkomnum fólki. Hesin lítli smádrongur var ikki vánaligur, hvörki av meslingum ella toxoplasmosis, og fekk onga eftirsjúku eftir meslingarnar. Vit mega halda, at tað var av tilviljum, at báðar sjúkurnar komu í senn hjá sama barni. Hetta týðir neyvan annað, enn at drongurin er vorðin smittaður við báðum sjúkum nakað um sama leitið. Vit vita, at toxoplasmosis kann vera ein eyðkennisleys, púra dumb ígerð, bæði hjá dýrum og fólki. Men vit vita einki um, at hon verður framd av meslingum. Sjálvandi kunnu vit hugsa okkum, at tað er tað, ið hent hevur. Hetta krevur sjálvandi, at likamið hýsir toxoplasmafrumkyknum, áðrenn tað verður smittað við meslingum.

Hesar báðar sjúkrasögur eru eyðkenniligar av tí stóru nögd av monocytum í blóðstrokstilbúningunum. Hjá fyrra sjúklinginum varð kannað 2 ferðir. Tölini vóru 69 og 57 %. Í sjúkusögu II var kannað 3 ferðir. Lægsta talið var her 14, og dagin fyri, sum hann fór av sjúkrahúsinum, kom tað upp í 44%. Hesar teljingar víkja frá öllum higartil kendum blóðmyndum frá sjúklingum við toxoplasmosis. Í Siims 3 ritgerðum [6, 7, 10] eru kannaðar 22 blóðstrokstilbúningar frá 9 sjúklingum. Øll monocyt-tölini liggja her ímillum $^{2}/_{3}$ og 7 %. Í fimm av hesum 9 sjúkradagbókum er eftir einstaka ella fleiri teljingar lagt afturat: »Atypiske lymfocyter af meget lignende karakter som mononucleose« ella onnur orð eru nýtt, sum siga tað sama, ivaleyst fyri at vísa á, at ilt er at seta mark millum lymfocytar og monocytar. Júst hetta sama verður sagt í 2. sjúkusögu, tá ið rannsóknarmaðurin á Dronning Alexandrines hospital í Tórshavn sigur: »Meginparturin av monocytunum eru óstaðnar kyknur.« Munurin er tí neyvan verunligur — vísist bert so.

Maðurin í 2. sjúkusögu kom heim av skipi úr Grönlandi í byrjan oktober 1951, og hann sjúklaðist fyrst í desember s. á. Tað man neyvan vera ivi um, at hann er smittaður, aftan á at hann er heimkomin, og ikki umborð á skipi, sum fiskaði við Grönland og síðan hevði 10—12 daga heimferð.

Tilgerðartíð toxoplasmosis er ókend hjá fólki, men orsök er til at halda, at hon í hvussu er, er styttri enn 2 mánaðir.

Tí fyrra av teimum báðum sjúku nýtti ikki viðgerð á sjúkrahúsinum. Hann var jú uttan hita dagin eftir, at hann var komin á sjúkrahúsið. Hin fekk bæði penicillin og aureomycin — hetta seinna fekk hann leingi ,— men uttan ávirkan. Hitin vardi frá tí, hann kom á sjúkrahúsið 17/12 1951 til 21/1 1952. Har afturat hitin, hann hevði tað vikuna, hann lá sjúkur heima, áðrenn hann fór til Tórshavnar, tað verða at siga $1\frac{1}{2}$ mánaðir tilsamans.

Har var hvörki hestur, kúgv, hundur, geit, grísur, kanin, gás ella dúva í hesum báðum húsunum. Eingin silvurrevur, minkur ella mús í hesum báðum bygdum. Haruskjótingin í Föroyum byrjar ikki fyrr enn 1. november, t. e. aftan á at smádrongurin er vorðin sjúkur. Maðurin í hinum húsinum hevði ikki skotið og heldur ikki etið haru, og hann hevði hvörki havt deyða ella livandi haru á hondum. Í báðum húsunum 6—8 hösn, sum öll vóru frísk, og í húsinum hjá dreinginum vóru dunnur. Í húsinum í L er einans ferð sæð rotta. Hvörgin sjúklingurin ella næstingar teirra hövdu hetta heystið (1951) etið bjargafugl. Tað er illa hugsandi, at sjúkan man vera fingin við biti ella stingi frá flogkyktum.

Vit kunnu einki samband vísa á ímillum hin sjúka dreingin í E og mannin í L. Strekkið ímillum bygdirnar er 14 km. Teir búgva hvör á síni oyggj við trongum sundi ímillum. Teir hava aldri sæð hvönn annan, og teir hava aldri verið saman í somu bygd. So vit hava lyndi til at halda, at einki er, ið teir báðir, sum við árslok 1951 gjördust sjúkir av toxoplasmosis, hava saman. Tó eru tvinnanda viðurskifti, ið bera saman: A. Ketta var í báðum húsum og B. seyður varð dripin í báðum húsum heystið 1951.

*A.* Kettan í húsinum hjá dreinginum var löða, og hon var kviðin. Hon var sjúk, tá ið drongurin 12. november fór á sjúkrahúsið, og hevði tá verið sjúk eina tíð — hvussu leingi, vita vit ikki. Nakrar fáar dagar eftir at drongurin

*var farin til Havnar, varð hon funnin deyð í einari hoy*löðu og hon hevði ikki lagt. Um sjúkueyðkenni vita vit lítið, undantikið at hon var rak; men einumhvörjum var eyðsýnt, at hon livdi ikki væl. Drongurin og kettan vóru altíð saman. Hann hevði hana nógv meira á hondum enn hini húsfólkini. — Kettan í hinum húsinum var fressur. Hann var lagdur í 1950 og var fast í $1\frac{1}{2}$ ára gl., tá ið maðurin í húsinum sjúklaðist. Fressinum hevur ongatíð bilað nakað, og maðurin var tann, ið hevði hann minnst á hondum. Fressurin var aloftast í kökinum, t. e. í tí rúmi, har húsfólkið vanliga fær sær at eta og annars um dagarnar situr.

Sum fyrr nevnt varð blóð frá konu hins 51 ára gamla sjúka og frá tveimum av trimum börnum hansara kannað við toxoplasmosisvísingum á Statens Seruminstitut. Úrslitið var negativt. Skeivt var, at blóð úr fressinum varð ikki roynt um somu leið. Hetta varð ikki gjört fyrr enn $1\frac{1}{2}$ ár seinni, í mei 1953. Fressurin var tá 3 ára gl. Toxoplasmahvörkigerðar-vísingin var tá veikt positiv 1 : 50, og komplementbindingarvísingin negativ $< 1 : 2$. Vísingin var eftir frásögn frá Statens Seruminstitut veik, men at hon var týðiliga positiv, er ikki ivi í.

Markið ímillum + og ÷ við hina fyrru av hesum báðum royndum man vanliga vera sett við 1 : 10, av tí at vísingar við hesari styrki verða taldar ógviliga veikt positivar, vísingin $< 1 : 10$ negativar. Úrslitið var 1 : 50, og tað er veikt positivt, men tó uttan iva positivt, so vit mugu halda, at fressurin onkuntíð — eingin kann siga nær — er vorðin smittaður við toxoplasmosis. Hvört hann so hevur smittað mannin, vita vit sjálvandi ikki. Eingin kann nú ætla um, hvussu blóðvísingin hevði verið, um fressurin hevði verið kannaður, tá ið maðurin sjúklaðist, t. e. $1\frac{1}{2}$ ár frammanundan.

Ókent er honum, ið hetta skrivar, hvussu leingi toxoplasmosis-vísingarnar hjá kettum vara, hvört tær nakrantíð koma í somu hædd sum hjá fólki, og um tær vikna, nær vit so kunnu vænta, at tær eru heilt horvnar. Ógjörligt er tí til

fullnaðar at týða úrslitið: positivur 1 : 50. Tó munu vit við vissu kunna siga, at sterkur illgruni er um, at kettan í L er smittuatvoldin. Somu hugsan hava vit um kettuna í húsinum hjá barninum í E. Kann vera, at hon hevði havt sjúkuna toxoplasmosis; men vit vita ikki við vissu. Í hvussu er, er mangt, sum týðir á, at báðar ketturnar hava verið smittaðar við toxoplasmosis og hava smittað av sær — kettan í L hóast hon ongantíð var sjúk.

Markið ímillum positiva og negativa toxoplasma-komplement-bindingarvísing verður vanliga avgjört so: positiv 1 : 2, negativ < 1 : 2. Henda vísing var hjá kettuni negativ.

Um somu tíð, sum hesir báðir tilburðir við toxoplasmosis í E og L vóru funnir, varð funnin sjúk ketta í einum húsi í L. Hon gjördist rak og drakk nógv vatn, fekk hon ikki annað. Í juni 1953, 1½ ár eftir at sjúka kettan var skotin, varð blóð tikið úr öllum húsfólkinum — 4 tilkomin — til toxoplasmarannsókn. Hvörkigerðarvísingin var negativ hjá trimum av teimum og ógviliga veik hjá tí fjórða 1 : 10. Men allar komplement-bindingar-vísingarnar vóru negativar < 1 : 2.

Allkunnugt er, at hundar verða smittaðir við toxoplasmosis. *Siim*[12] fann t. d., at 10 av 54 hundum í Keypmannahavn (18 %) hövdu positiva sveitavatnsvísing fyri hesa sjúku í tynningarstigi > ella = 250. Vit muga halda, at hetta vóru frískir hundar, sum einki merki bóru av sjúku.

Í 1947, o. u. 4 ár áðrenn teir 2 tilburðirnir við toxoplasmosis vóru avgjördir, gekk í næstan öllum bygdum í Eiðis læknadömi ein hættislig, ofta drepandi, at vísa seg smittsom hundasjúka. Her er ikki rúmd til at greina gjölliga um eyðkennini við hesi sjúku. — Tað lá tí, um nýggjársleitið 1952, raðið at kanna eftir, um henda hundasjúka mundi hava verið toxoplasmosis. Um so hevði verið, vóru líkindi til at halda, at einstök fólk kundu hava verið smittað. Og kanska vóru líkindi til at finna broytingar í blóðinum, orsakaðar av hesari smittu. Tí varð fyrstu mánaðirnar í 1952, frá 6 tilkomnum fólkum úr 4 ymissum húsum, sent blóð til Statens Seruminstitut til rannsóknar viðvíkjandi hesari sjúku. Í

hvörjum einstökum av hesum 4 húsum hövdu tey í 1947 havt ein ella fleiri hundar, sum tá hövdu havt sjúkuna. Hjá tí fimta, 30 ára gomlum manni, var hvörkigerðar-vísingin ógviliga veikt positiv 1 : 10, hin vísingin < 1 : 2. Hjá tí sætta, 35 ára konufólki, var úrslitið positivt ávikavist í tynninigi 1 : 250 og 1 : 4. At royndin her vísti positivt, er ikki ivi í; men vit tora sjálvandi ikki siga, at upphavið er frá tí hundinum, sum sjúkur var í 1947; men sum við kettunum í E og L er sterkur illgruni um, at hesin hundurin er smittuatvoldin. Sjúkar kettur vóru ongantíð í húsinum.

Eisini varð í 1952 blóð tikið úr 4 fólkum, sum vóru sjúk, og hvörs eyðkenni möguliga bendu á toxoplasmosis. Men tey vístu öll negativt við báðum vísingum. Sama var við blóðinum frá 2 húsfólkum hjá einum av omanfyri nevndu fýra. Eisini har vóru negativar vísingar.

At enda varð, í apríl 1952, blóð sent til Statens Seruminstitut frá 2 systrum, sum hvör hevði átt barn við vatn í hövdinum, onnur 1940 og hin í 1951. Hesar báðar vísingar vóru eisini negativar.

*B.* Oktober mánaður er skurðtíðin í Föroyum. Frá miðjan oktober til byrjan í november verða dripin o. u. 30.000 lomb og gamalseyðir. Í húsinum í E vóru dripin 2 lomb, og í húsinum í L eisini 2 lomb — báðum stöðum miðjan oktober. Ivaleyst er, at seyður fær toxoplasmosis; men ógviliga fáir tilburðir munu vera kunngjördir. *Sjolte*[2] nevnir, at *Olafson* og *Monlux* í amerikanskum tíðarriti hava rött um hesa sjúku hjá einum seyði: »Sygdommen var patologisk anatomisk encephalomyelitis med toxoplasmaer i de betændte omraader«. — Lukkutíð er einki, ið bendir á, at föroyski seyðurin er smittaður; men orsök er til í framtíðini, um vit hitta sjúkan seyð, at hava í huga toxoplasmosis.

Allkunnugt er, at í Föroyum verður etið nógv turt kjöt, skerpikjöt. Fyrsta tað er etandi, er 2 mánaðir eftir at vera hongt upp, og ofta verður tað ikki etið, fyrr enn tað hevur hingið í fleiri mánaðir. Meðan toxoplasma-frumkyknan liv-

ur bert fáar dagar, eftir at verturin er deyður, hevur hann, ið etur skerpikjöt, neyvan nógv at óttast fyri, um seyðurin so verður smittaður.


## SUMMARY

Two cases of toxoplasmosis occurred in the Faroes in October and December 1951. The first patient was an eight year old boy who fell ill with adenitis colli immediately after recovering from measles. In the case of the other patient, a man of 51, the illness strongly suggested sepsis; he ran a temperature, at times high, for six weeks. Toxoplasma reactions in the blood were markedly positive with both patients. The source of infection is unknown, but suspicion falls on the cats belonging to the patients' homes. One of these cats died of an unknown and uninvestigated complaint, which could conceivably have been toxoplasmosis. The other cat showed a positive neutralisation reaction (1:50) a year and a half after the owner's illness.

Blood from 22 adults, all living at home, was tested during 1952 and 1953 with toxoplasma reactions. 16 tests were negative, 5 showed very slight positive neutralisation reactions (1:10), while in a single case both reactions were positive (1:250 and 1:4). In this case the dog living in the house may well have been the source of infection. In 1947 this animal was attacked by a very prevalent, infectious and often fatal canine disease.


## BÓKMENTIR


1. *Christiansen, M.:* De vigtigste smitsomme sygdomme hos vildtet. Maanedsskrift for Dyrlæger *47:* 460 1935—36.
2. *Sjolte, J. P.:* Toxoplasmosis canis. Skandinavisk veterinärtidsskrift. Årg. XXXVII. Häft 9. 501. 1947.

3. *Christiansen, M.:* Toxoplasmose hos harer i Danmark. Medlemsblad for den danske dyrlægeforening. *31:* 93, 1948.
4. *Boesen, Ib:* Et tilfælde af kongenit toxoplasmose. Ugeskr. f. Læger, *110:* 226, 1948.
5. *Christiansen, M.:* Eksperimentel toxoplasmose hos harer. Medlemsblad for den danske dyrlægeforening, *31:* 505, 1948.
6. *Siim, J. Chr.:* Toxoplasmosis acquisita. Ugeskr. f. Læger. *113:* 353, 1951.
7. *Siim, J. Chr.:* Studies on acquired toxoplasmosis II. Acta pathologica. Vol. XXX, Fasc. 1, 1952.
8. *Bang, Fridtjof:* Bidrag til den kliniske og histologiske diagnose af lymfogranulomatose og af den glandulære form af toxoplasmose. Ugeskr. f. Læger *115:* 113, 1953.
9. *Kristensen, Martin:* Undersögelse over den Bangske abortbacils rolle som menneske-patogen mikrob. Ugeskr. f. Læger, *89:* 1123, 1927.
10. *Siim, J. Chr.:* Studier over toxoplasmosis acquisita III. Ugeskr. f. Læger, *114:* 1375, 1952.
11. *Siim, J. Chr.:* Toxoplasmose. Nordisk lærebog i pædiatri. Kap. 34: 835, Kbhvn. 1952.
12. *Siim, J. Chr.:* Epidemiological aspects of Toxoplasmosis, »Summaries of Communications«, 6th Intern. Congress of Pediatrics. Zürich 1950.